## Semja millum øðrumegin Føroya Arbeiðarafelag og hinumegin Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um sáttmálan fyri dagrøktarar

**1.** Verandi sáttmáli verður framlongdur til tann 1. oktober í 2015.

**2.** Tann 1. oktober í 2013 hækkar mánaðarlønin við 190 kr. + 0,9%.

**3.** Tann 1. oktober í 2014 hækkar mánaðarlønin við 1,9%.

**4.** Broytt grein 6, petti 2: Samsýning fyri 5 gestarøktir í einum 8 viku tíðarskeiði er íroknað lønini hjá einum fulltíðarløntum dagrøktara. Treytin fyri allari gestarøkt er, at samlaða barnatalið ongantíð fer upp um 5 børn. Hevur dagrøktari 4 børn undir 3 ár í ansing, kann hesin bert taka 1 barn undir 3 ár í gestarøkt. Fyri parttíðarløntar dagrøktarar er sama regla galdandi, tó so, at samlaða barnatalið ongantíð fer upp um 4 børn. Gjørt verður upp fyri 8 vikur ísenn.

**5.** Av eftirlønargjaldinum verður 1,5% lagt omaná lønina, soleiðis at dagrøktarar framyvir sjálvir rinda til kollektivu lívstryggingarskipanina hjá Føroya Arbeiðarafelag.

*Í Tórshavn 2. septembur 2014*

Føroya Arbeiðarafelag Kommunala Arbeiðsgevarafelagið